# Deco tryggjaði stigini



Portugisiski landsliðsspælarin Deco var stóri maðurin, tá Chelsea vann á Wigan í gjár. Miðvallarin sendi eitt fríspark beinleiðis upp í málhornið. Chelsea hevði gott tak á dystinum, og í seinna hálvleiki megnaði Wigan ikki at hótta London-liðið, og tey trý stigini endaðu tí í skjáttuni hjá Chelsea, sum hevur vunnið báðar teir fyrstu dystirnar í Premier League.

# Bragdið kom á forsíðuni hjá New York Times

**Enn einaferð er staðfest, at ítróttarbrøgd er besta umtala, sum ein pinkutjóð kann vinna sær**

OL

*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin.fo*

Brøgdini hjá íslendska manslandsliðnum í hondbólti hava givið afturljóð kring Heimin. Enntá eitt hitt kendasta blaðið í Heiminum, New York Times hevur íslendska ítróttarbragdið á sínari forsíðu. Og tá er hondbóltur ikki mest kenda ítróttargreinin í USA. New York Times roynir at útgreina fyri ókunnugu amerikonsku lesarunum hvat hondbóltur er fyri nakað: "Hondbóltur er sum basketball við málum, ístaðin fyri kurvar" er mest sigandi lýsingin. Blaðið vísir á hvussu fantastiskt tað er, at eitt land við bara 300.000 íbúgvum er komið í eina finalu. Tað svarar til íbúgvaratalið í Bakersfield í Kalifornia ella Toledo í Ohio. New York Times endurgevur eisini forseta Íslands, Ólaf Ragnar Grímsson fyri at siga, at hetta er størsta løtan í ítróttarsøgu Íslands.

Ólafur Ragnar rør í samrøðuni aftur á summarleikirnar í Melbourne í 1956, tá Vilhjálmur Einarsson vann fyrsta olympiska heiðursmerki Íslands. Vilhjálmur vann silvur í trístøkk. Íslendski forsetin sigur við New York Times:

- Eg minnist tá Ìsland vann sítt fyrsta olympiska heiðursmerki, eg búði sum ein 13 ára gamal drongur í einari lítlari fiskibygd (Ísafjørður red.), og eg minnist, at øll tjóðin hátíðarhelt hetta silvurmerkið. Men fyri eina lítla tjóð at møta upp í liðítrótti, og vinna á summum av teimum størstu tjóðunum, sum hava miljónir av fólkum. Tað er eini boð til altjóða ítróttarrørsluna, at alt er møguligt!, Ólafur Stefánson segði við blaðið.

- Tað snýr seg um at stríðast fyri 300.000 fólk, sum hava sama tungumál, sum eg.


The New York Times

*Góð ítróttarúrslit geva umtalu*

# Áttu næst- og triðbesta málskjúttan

Snorri Steinn Guðjónsson var bert tvey mál frá at gerast toppskjútti. Íslendski málverjin, Bjørgvin Páll Gustavsson gjørdist nr. 10 í bjargingum

**Manshondbóltur: OL-toppskjúttar:**

1. Juan Garcia, Spania 49 mál
2. Snorri Steinn Guðjónsson, Ísland 48 mál
3. Guðjón Valur Sigurðsson, Ísland 43 mál
4. Lars R. Christiansen, Danmark 42 mál
5. Michael Kraus, Týskland 38 mál
6. Mariusz Jurasik, Pólland 37 mál
6. Nikola Karabatic, Frakland 37 mál
8. Konstantin Igropulo, Russland 36 mál
8. Jesper Nøddesbø, Danmark 36 mál
10. Bertrand Gille, Frakland 35 mál
10. Daniel Narcisse, Frakland 35 mál
10. Albert Rocas, Spania 35 mál

Bestu málverjar í prosentum:

1. Thierry Omeyer, Frakland 41%
2. Johannes Bitter, Týskland 41%
3. Mohamed Nakib, Egyptaland 40%
4. Slowomir Szmal, Pólland 37%
5. David Barrufet, Spania 36%
5. Oleg Grams, Russland 36%
5. Kasper Hvidt, Spania 36%
5. Alexey Kostygov, Russland 36%
5. Malk Santos, Brasilia 36%
10. Bjørgvin Páll Gustavsson, Ísland 33%
10. Kyungtai Han, Korea 33%
10. Venio Losert, Kroatia 33%

Og sigast má, at tey 8% sum eru millum Thierry Omeyer og Bjørgvin Páll Gustavsson sóust aftur í OL-finaluni.

